


*Porsche modellini í 2008 f.v.: Porsche 911 Turbo Cabriolet, Cayman S, Boxster og Cayenne GTS*

# Porsche 60 ár

**Í hesum døgum eru 60 ár liðin síðan fyrsti Porsche bilurin varð gjørdur. Porsche, sum eru millum heimsins best kendu sportbilar, gera í dag fýra ymisk modell sum verða gjørd í nógvum ymiskum útgávum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sunnudagin 8. juni vóru 60 ár liðin síðan fyrsti týski Porsche bilurin var gjørdur í 1948. Talan var um ein Porsche 356 við stell-nummarinum 356-001.

Porsche ævintýrið byrjaði við, at Volkswagen stjórin Ferdinald Porsche ynskti sær ein veruligan dreymabil, men fann ongan.

Hetta førdi so til, at hann tók avgerð um at framleiða dreymbilin sjálvur.

Hesi 60 árini hava Porsche verið í støðugari menning og fleiri modell eru komin afturat.

Í dag verða Porsche gjørdir í hesum modellum: Porsche Boxster, Cayman, 911 og Cayenne, sum a verða gjørdir í nógv ymiskum útgávum.




*Ferdinand Porsche (1875–1951) (h.m.) og sonurin Ferry við fyrsta Porsche bilinum, sum varð gjørdur í 1948*



*Porsche 356*



# Burturbeining av bilvrakum




Í sambandi við at summarið er komið, og nógv ferðafólk vitja í Føroyum bjóðar bilfyritøkan Sp/f Bilrøkt seg fram við síni flutningshjálp at burturbeina bilvrak, sum standa nógva staðni kring landið.

Eftir at burturbeiningargjaldið fyri bilvrak hækkaði við nýggju umhvørvislógunum, sum komu í gildi tann 1. juni, er møguleiki fyri at geva fólki eitt sera gott tilboð í sambandi við burturbeining av akførum, sigur Jákup á Borg frá Bilrøkt.

*Sp/f Bilrøkt í Stiðjagøtu í Havn hevur tveir sergjørdar bilar til hjálpar- og flutningstænastur. Sigurbjørn Ragnarsson er bilførari hjá flutningshjálpini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*